*Familjuævintýrið*
*The Goonies*




# The Goonies

Familju/ævintýrfilmur frá 1985 við: Sean Astin (Michael Walsh), Josh Brolin (Brandon Walsh), Jeff Cohen (Lawrence Cohen), Corey Feldman (Clark Devereaux), Kerri Green (Andrea Carmichael), Robert Davi (Jake Fratelli), Curtis Hanson (Elgin Perkins), Anne Ramsey (Mama Fratelli)
Leikstjórnað: Richard Donner



*The Goonies leita eftir einum dýrgripi*

**Á Tv3 leygarkvøldið kl. 19.00**

Brøðurnir Mikey og Brand fáa at vita, at pengagrammir handilsmenn ætla at noyða familju teirra at flyta. Tí avgera teir báðir og vinirnir at fara út á eina ævintýrferð, eina seinastu ferð saman. Og hetta er eitt rættiligt ævintýr - við loyniligum holum, einum gomlum vitatorni, einum skattakorti, einum misháttum risa og so sjálvandi tí goymda dýrgripinum. Uppi á loftinum finna teir skattakortið, teir gera eitt brøðralag og kalla seg "Goonie´arnir". Síðan fara teir avstað við tankum um skattin og at fáa tryggja, at Mikey og Brand ikki noyðast at flyta. Men tað er ikki bara goonie-bandin, sum hevur fingið gullfepur. Eitt brotsmannalið roynir at finna skattin, áðrenn teir ungu. Ein øgilig kapprenning byrjar.

# Orkidé-tjóvurin



*Meryl Streep í leiklutinum sum høvundurin Susan Orlean, ið hevur skrivað bókina "Orkidutjóvurin"*

**Á Canal+ Film2 sunnukvøldið kl. 19.00**

Spennandi skemtifilmur frá 2002 við: Nicolas Cage (Charlie Kaufman/ Donald Kaufman), Meryl Streep (Susan Orlean) og Chris Cooper (John Laroche)...
Leikstjórnað: Spike Jonze
Filmshandrit: Charlie Kaufman
Upprunaheiti: Adaptation

Charlie Kaufman fær til uppgávu at skriva bókina hjá tí kenda høvundanum Susan Orlean um til film. Bókin "The Orchid Thief" snýr seg um ein heldur sjáldsaman orkidésamlara, John Laroche. Men tað gongur sera illa hjá Kaufman við arbeiði sínum at skriva bókina um til film. Og tað gerst alsamt torførari, og løgnari, tá tvíburabróðir hansara Donald flytur inn. Donald, ið eins og Kaufman, eisini so gjarna vil skriva filmsleikrit, herjar á við at skriva leikrit til ein aktionfilm. Donald hevur ein heilt annan arbeiðshugburð, hann arbeiðir um næturnar og órógvar Kaufman inntil tað stendur á at bresta. Filmurin kann sigast at vera ein hálv sjálvsævisøga um filmshøvundan, ið hevur skrivað handritið til hendan filmin - nevniliga Charlie Kaufman.



*Nicolas Cage í leiklutunum sum Charlie Kaufman og Donald Kaufman*